Nógv undirhald á Torginum

Í dag og í morgin verður »Wanna B-kappin«g og EM-Torg í SMS

KAPPING

Í SMS skipta tey fyri tí, ið tey rópa »Wanna B-kapping«.

– Í ensku orðagreipuni stendur, at »Wanna B«, merkir at »vilja-vera-sum«. Og tað er júst hetta, ið kappingin snýr seg um, nevnliga, at luttakararnir skulu líkjast onkrum kendum sangara ella songkonu so nógv sum gjørligt, siga tey í SMS.

Tey hava tónleikin, meðan luttakararnir skulu sjálvir skipa fyri framførsluni. Kappingin fevnir um tveir dagar ella kvøld. Byrjað verður við einum undanumfari fríggjadagin 25. juni kl. 19.00. Sjálvt finaluumfarið verður leygardagin 26. juni kl. 14.00.

Á Torginum er settur upp ein pallur, har tilmeldaðir luttakarar sleppa at royna seg sum teirra tónleikarafyrimynd. Meira luttakarin líkist – klæðir, smyrsl, dansifet, andlitskeipur – størri er møguleikin at sleppa í finaluna. Luttakararnir syngja ikki sjálvir, men tað er hinvegin av týdningi, at teir kenna tekstin, tí, sum sagt, meir teir líkjast, størri er møguleikin at vinna. Tríggir dómarar eru settir at døma, og tað eru teir, sum avgera, hvør fer víðari í kappingini. Ialt 21 luttakarar hava boðað frá luttøku, og av teimum sleppa ialt 8 víðari í finaluumfarið.

EM Torgið

Fríggjadagin og leygardagin er EM Torgið – sum SMS skipar fyri saman við Atlantic Airways og Coca-Cola – eisini opið, har m. a. EM-fótbóltur verður vístur og vitjandi kappast um heitið, at gerast besti EM-skjúttin.

2. og 3. innleiðandi umfar í kappingini um besta EM-skjúttan verður í vikuskiftinum. 2. umfar er fríggjadagin millum kl. 16.00 til 18.00 og 3. umfar er leygardagin millum kl. 11.00-13.00. Tólv teir bestu skjúttarnir í innleiðandi umførunum fara í finaluna, sum verður leygardagin 3. juli kl. 13.00. Vinnarin fær tveir Apex-flogferðaseðlar frá Atlantic Airways, eitt minikøliskáp frá Coca-Cola og tveir kassar av Coca-Cola 0,5 ltr. Nr. 2 og 3 vinna hvør sín Apex-flogferðaseðil frá Atlantic Airways og tveir kassar av Coca-Cola 0,5 ltr hvør. Í sambandi við tiltakið í vikuskiftinum skipar Coca-Cola fyri ymiskum undirhaldi og kappingum og bjóða teir eisini smakkiroyndir. Til ber at lesa meira um tiltøkini í SMS á www.sms.fo

Í dag og í morgin verður »Wanna B-kappin«g og EM-Torg í SMS

Web-kamera á fleiri støðum

Tórshavnar Bátafelag hevur havt aðalfund, og nevndin er óbroytt. Í nevndini sita formaður Kartni Olsen, næstformaður Øssur Hjalt, kassameistari Alvi Nielsen, skrivari Páll Klein, og nevndarlimur Erhard Mortensen. Tiltakslimir eru Petur Jensen og Jegvan Bæk.

Tórshavnar Bátafelag hevur eisini fingið nýggja heimasíðu, sum eitur www.marina.fo. Har finnast upplýsingar um bátafelagið, tíðindi, frásøgnir frá túrum, og myndir við web-kamera. Myndirnar frá web-kamera verða tiknar frá fleiri støðum á eystaru og vestaru vág og á Argjum. Tríggir siglitúrar hava verið higartil í ár. Siglt varð til kjalarvatnsstevnu í Vestmanna, til eystanstevnu í Runavík, og til útoyggjastevnu í Hesti.

Eitt afturvendandi tiltak, sum er á skránni hjá Tórshavnar Bátafelag, er siglitúrurin til Noregs. Ætlanin er aftur í ár at sigla fram við skergarðinum í einar tvær til fýra vikur. Teir umleið 13 bátarnir, sum skulu við, verða førdir til Bergen vid Norrønu, har siglt verður frá.

Og beint undan ólavsókuni hevur bátafelagið bryggjudans á skránn. Enskur og føroyskur dansur verður í Vágsbotni tann 24. juli.

hkm

Elektronisk tollavgreiðsla

Í eTollskipanini hjá Toll- og Skattstovu Føroya hevur nú í 1 ár verið møguligt hjá tollkredittkundum at tolla heimanífrá

Næsta stig er, at vinnuligu kontantkundarnir eisini kunnu nýta eTollskipanina. Hetta verður møguligt eftir summarfrítíðina 2004.

Elektronisk tollavgreiðsla er, at innflytarar,ið eru vinnuligir kontantkundar, elektroniskt senda fakturaupplýsingar til Toll- og Skattstovu Føroya og gjalda tollrokningina um netið.

Til ber at søkja um at gerast brúkari av eTollskipanini við at venda sær til økið, har virkið er skrásett, ella fara inn á heimasíðuna hjá Toll- og Skattstovu Føroya www.tollskatt.fo og útfylla eitt umsóknarblað.

Á heimasíðuni www.etoll.fo fer tollavgreiðslan fram við beinleiðis sambandi við Toll- og Skattstovu Føroya. Innflytarin fær soleiðis beinanvegin at vita, um tollavgreiðslan er góðkend.

Henda skipanin er enn ikki galdandi fyri vørur, sum verða innfluttar gjøgnum postverkið.

Tollkredittkundar freist til 1. juli

Teir kredittkundar, sum enn ikki nýta elektronisku tollskipanina fáa freist til 1. juli 2004 at gerast eTollbrúkari. Eftir 1. juli verður bert møguligt at hava tollkreditt í eTollskipanini. Tann gamla tollkredittskipanin dettur burtur. Vístverður til kunngerð nr. 37 frá 7. juni 2004, sum kemur í gildi 1. juli 2004.

STARVSLÝSING

Kunningarfólk

Fyri kunningarfólk okkara í barsilsfarloyvi verður søkt eftir avloysara at byrja beinanvegin á starvsfólkadeildini.

Starvsfólkadeildin varðar av starvsfólkamálum, skrivstovufyrisiting og aðrari umsiting.

Arbeiðsuppgávur
Starvið fevnir í høvuðsheitum um, í samstarvi við deildarleiðaran og onnur skrivstovufólk á starvsfólkadeildini, at røkja ymiskar uppgávur viðvíkjandi samskifti og kunning innanhýsis og úteftir, heimasíðuviðlíkahald og aðrar meira vanligar skrivstovuuppgávur. Talan er um eitt starv við spennandi avbjóðingum, og sum gevur góðar møguleikar fyri persónligari og fakligari menning.

Førleikakrøv
Umsøkjari skal hava viðkomandi útbúgving og royndir, helst innan omanfyri nevndu øki, og duga væl at málbera seg skrivliga, serliga á føroyskum. Tað er umráðandi, at tann,ið settur verður, hevur góð samstarvsevni, hugflog, dugir at arbeiða miðvíst, sjálvstøðugt og ábyrgdarfult og er til reiðar at royna nýggjar avbjóðingar, um tað skal verða. Góður kunnleiki til tær edvskipanir, ið vanliga verða nýttar á skrivstovum, er ein treyt.

Setanartreytir
Løn og setanartreytir annars vera sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Umsóknir
Umsóknir við prógvum og lívsgongdarlýsing (cv) verða at senda til:
Landsverk
Postsmoga 78
110 Tórshavn
og skulu verða skrivstovuni í hendi í seinasta lagi 5. juli 2004. Merkið brævbjálvan "Kunningarfólk".
Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast frá Levi Hentze, starvsfólkaleiðara, á tlf.311 333 (e-postur:lh@lv.fo).

www.sansi.fo

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 311 333, Faks 314 986, lv@lv.fo, www.landsverkv.fo

LANDSVERK byggir land

Loksins er ivin burtur

Landsstýrismaðurin, Bárður Nielsen og danski búskaparmálaráðharrin, Bendt Bendtsen, hava gjørt avtalu um, at føroyska landsstýrið fær fult innlit í føroysku peningastovnarnar og onnur fíggjarviðurskifti

LÓGARTRYGGJAÐ INNLIT

Páll Holm Johannesen
pall@sosialurin.fo

– Ivin er nú endaliga burtur. Kemur ein føroyskur peningastovnur í kreppu, fáa vit nú boðini at vita alt fyri eitt. Vit sleppa nú frá at hugsa um vit hava fingið allar upplýsingar frá dønum, tá ein avgerð skal takast, og tað fegnast vit sjálvsagt um, sigur Bárður Nielsen.

Føroyskir myndugleikar hava í fleiri ár ilskast á danir um, at danskir politikkarar hava tvíhildið um, at teir ikki vilja veita føroyingum innlit í føroyska peningarstovns- og fíggjarøkið.

-Ivin er nú endaliga burtur. Kemur ein føroyskur peningastovnur í kreppu, fáa vit nú boðini at vita alt fyri eitt. Vit sleppa nú frá at hugsa um vit hava fingið allar upplýsingar frá dønum, tá ein avgerð skal takast, og tað fegnast vit sjálvsagt um, sigur Bárður Nielsen

Á fundi við danska búskaparmálaráðharran, Bendt Bendtsen, er nú avtala komin í lag um, at føroyska landsstýrið fær sama innlit í føroysk peningastovns- og fíggjarviðurskifti, sum danska Fíggjarhevur í dag. Innlitið í føroyska peningastovns- og fíggjarøkið skal staðfestast við lóg.

Ongan spenning

Síðan kreppuárini hava føroyskir politikkarar javnan gjørt vart við vantandi innlitið í føroysku peningarstovnarnir. Í kjalarvørrinum av bankakreppunum fyrst í nítiárunum, og avtaluni millum føroyingar og danir í 1998, tá tað varð staðfest, at føroyingar fingu evstu ábyrgd á búskaparpolitikkinum, hevur eitt áhaldandi ynskið verið frá føroyskari síðu um størri innlit

Hví hava danir loksins valt at geva okkum innlit?

– Teir hava helst ásannað, at tað varð trupult at avvísa føroyska ynskið um innlit. Føroyingar hava leingi havt eitt ynski um at fáa innlit, og teir hava helst tikið ynskið í álvara. Høvdu teir áhaldandi gingið móti føroyskum ynskjunum, kundi tað elvt til óneyðugar spenningar millum Føroyar og Danmark, og tað ynskir hvørgin partur, svarar Bárður Nielsen.

Arbeiðsbólkur

Í næstum fer ein arbeiðsbólkur við bæði føroyskum og donskum embætisfólki at greina, hvussu landsstýrið endaliga kann fáa innlit í peningatovns- og fíggjarviðurskiftini.

Seinni í ár skal arbeiðsbólkurin koma við sínum tilmælum, og ætlanin er, at Føroya Løgting skal taka støðu til eitt lógaruppskot um innlit í peningastovns- og fíggjarøkið í komandi tingsetu.

Dupultskattaavtala fáast í lag

Landsstýrismaður-in í fíggjarmálum, Bárður Nielsen skuldi á middegi í gjár hitta danska skattamálaráðharra num, Svend Erik Hovmann á málið um eina dupultskattaavtalu, har ætlanin er, at føroyingar krøkja seg í dupultskattaavtalurnar, sum danir hava við aðrar tjóðir

DUPULTSKATTA-AVTALA

Páll Holm Johannesen
pall@sosialurin.fo

Á middegi í gjár var ætlanin, at landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Bárður Nielsen, skuldi avgreiða seinasta fundin við danir á hesum sinni. Seinasti fundur var við skattamálaráðharran, Svend Erik Hovmann.

Landsstýrismaðurin og skattamálaráðharrin skuldi umrøða møguleikan fyri eini dupultskattaavtalu millum danir og føroyingar. Stendur tað til Bárð Nielsen skulu føroyingar krøkja seg í dupultskattaavtalurnar, sum danir hava við aðrar tjóðir.

Hjálpir vinnulívinum

– Eg síggi stórar møguleikar hjá føroyskum vinnulívi um vit krøkja okkum í dupultskattaavtalurnar hjá dønum. Vanliga er tað rættiliga stríggið hjá føroyskum fyritøkum at fara undir at arbeiða í fjarskotnum londum, men ein avtala við danir kann broyta hesa myndina, heldur landsstýrismaðurin í fíggjarmálum.

Bárður Nielsen væntar, at ein dupultskattaavtala fer at gera tað lættari hjá føroyskum fyritøkum at leita sær út um føroysku landoddarnar eftir arbeiði. Hann sigur, at eydnast tað at fáa eina avtalu í lag við danir, kunnu føroyskar fyritøkur vænta sær eina væl skjótari viðgerð í skattamálum við tey avvarðandi londini, sum ætlanin er at arbeiða í.

Grundtankin við eini dupultskattaavtalu er, at fer ein føroysk fyritøka til eitt nú Peru at arbeiða, so rindar føroyska fyritøkan skatt í Føroyum, hóast arbeiðið verður gjørt í Peru.

Føroysk mynd á 20 krónu

Tjóðbankin fer í næstum at geva eina 20 krónu út við føroyskum myndevni

FØROYSK MYND

Páll Holm Johannesen
pall@sosialurin.fo

Tað vóru ikki bara turr búskaparhugtøk, sum landsstýrismaðurin, Bárður Nielsen, og Bodil Nyboe Andersen, danski Tjóðbankastjórin, viðgjørdu á fundinum seinnapartin mikudagin.

Í næstum fer Danski Tjóðbankin at geva eina serútgávu við 20 krónum myntum út, og eftir ætlan verður eisini eitt føroysk myndevnið á seruútgávuni. Tjóðbankin fer at geva út eina rað av 20 krónum, har ymisk torn eru myndevni.

Eitt føroysk torn skal prýða eina av teimum nýggju myntunum, ið skulu gevast út. Bárður Nielsen sigur, at føroyingar í næstum skulu gera av, hvat torn verður føroyska myndevnið.

Eingin rentulækking á hesum sinni

Danski fíggjarmálaráðharrin, Thor Petersen og Bárður Nielsen nýttu ikki nógva tíð til at umrøða útsagnirnar á stevnuni um blokkin hjá Norðuratlantsbólkinum. – Danska stjórnin er fullgreið yvir, at útsagnirnar á ráðstevnuni ikki umboða sjónarmiðini hjá landsstýrinum, sigur landsstýrismaðurin í fíggjarmálum

EINGIN RENTULÆKKING

Páll Holm Johannesen
pall@sosialurin.fo

Tað eydnaðist ikki landsstýrismanninum í fíggjarmálum, Bárði Nielsen, at lækka rentuna á føroyska láninum til danska statin. Á fundi við danska fíggjarmálaráðharran, Thor Petersen, mikudagin, hevði Bárður Nielsen sett nøsina eftir at lækka rentuna úr 5 % niður í 4,5 %, men Thor Petersen var ikki til at vika.

Thor Petersen grundgevir við, at rentan kring heimin er á veg upp, og tí setur hann seg ikki føran fyri í løtuni at lækka rentuna á føroyska láninum. Danski fíggjarmálaráðharrin segði seg kortini vera sinnaðan viðgera rentuna seinni.

– Tað er harmiligt, at danski ráðharrin ikki vil lækka rentuna, men eg skilji væl hansara sjónarmið, sigur Bárður Nielsen

Lánið hjá føroyingum til danska statin er í dag 1,650 mia. krónur. Við Útvarp Føroya mikukvøldið segði Bárður Nielsen, at ein rentulækking á 0,5 % hevði svarað til eina árliga sparing á góðar 8 mio. krónur hjá landskassanum

Ráðstevnan ávirkaði ikki

Nógv umrødda stevnan um blokkin hjá Norðuratlantsbólkinum á Christiansborg varð eisini havd á lofti á fundinum millum Bárð Nielsen og Thor Petersen.

Spurdur, um umrøðan í donskum fjølmiðlum hevði ávirkað danska fíggjarmálaráðharran, svarar Bárður Nielsen, at danska stjórnin er fullgreið yvir, at útsagnirnar á ráðstevnuni ikki umboða sjónarmiðini hjá landsstýrinum.

– Vit tosaðu leystliga um fiskimannafrádráttin og føroyska skattatrýstið, sum eisini kom fram undir ráðstevnuni. Vit nýttu kortini ikki nógva tíð til at viðgera útsagnirnar á ráðstevnuni, vísir Bárður Nielsen á.